

*Rógvi Jacobsen sæst her lesa tíðindini á portalinum um, at hann skuldi skifta til SønderjyskE. Fáar dagar seinni var hetta veruleiki, og mikukvøldið var hann fyri fyrstu ferð á liðnum, sum tó tapti 2-1 fyri Horsens í steypakappingini*

# Lamhauge heldur fram í somu øði

**Feløg hjá trimum útisetum tryggjaðu sær mikukvøldið pláss í áttandapartsfinaluni, meðan SønderjyskE dumpaði á heimavølli, tá ið Rógvi fekk fyrsta møguleikan at royna seg**

DANSKA STEYPAKAPPINGIN
*Jóannes Hansen*

Tað var pressufundur í Haderslev seinnapartin mikudagin. Rógvi Jacobsen varð vístur fram sum nýggjur spælari hjá SønderjyskE, og tað varð kunngjørt, at tveir spælarar høvdu skrivað undir nýggjar sáttmálar.

Mesti áhugin snúði seg kortini um, at felagið kunngjørdi, hvør nú skal standa á odda fyri superliguliðnum, eftir at venjarin higartil herfyri kendi seg noyddan at taka seg aftur, eftir at hann í bilinum var dumpaður í rúsdrekkakanning.

Morten Bruun er nýggjur venjari hjá Rógva Jacobsen. Seinastu árini hevur hann fyri tað mesta verið viðmerkjari í sjónvarpinum. Í síni tíð spældi hann 424 dystir í Silkeborg og 11 landsdystir. Hann tók venjaraábyrgdina í Silkeborg á seg í 2001, tá ið tað sá ógvuliga svart út. Tað varð mett at vera bragd, at tað eydnaðist honum at venda skútuni, so liðið slapp undan niðurflyting. Venjarin valdi tá beinanvegin at leggja frá sær aftur. Nú fer tað í SønderjyskE at vera høvi at síggja, hvussu hann og Rógvi Jacobsen og hinir spælararnir fara at standa seg. Málið er í fyrsta umfari at sleppa undan niðurflytingini. Morten Bruun og SønderjyskE hava skrivað undir samstarvsavtalu inntil á sumri í 2007.

Fyrsta ferðin, at nýggi venjarin fer at sita á beinkinum í SønderjyskE, verður sunnudagin, tá ið Esbjerg fer at vitja og satt botnstríð verður á skránni í Haderslev. Mikukvøldið var nýggi venjarin millum áskoðararnar, og fyri hann og hini í SønderjyskE var tað stórt vónbrot, at liðið tapti 2-1 móti Horsens, sum er felagið hjá Johan B. Hansen.

Rógvi Jacobsen var útlikin at vera millum teir sekstan á listanum hjá SønderjyskE. Luttøkan hjá honum var treytað av, at spæliloyvið var komið úr Íslandi, og undan uppgerðini móti Horsens høvdu teir í Haderslev fingið pappírini upp á Rógva. Seinnapartin av 2. hálvleiki vardi Horsens, og heimaliðið trýsti fyri at fáa mál. Tá ið tað restaðu tjúgu minuttir, varð Rógvi Jacobsen settur á vølllin, men tað segði tað sama. SønderjyskE hevur ikki serliga steypasøgu at vísa á, og heldur ikki í hesum kappingarárinum rukku teir longri enn í 16. parts finaluna.

Johan B. Hansen var ikki á Horsens liðnum, sum vann 2-1 í Haderslev.

## Christian heldur fram

Fyrrverandi landsliðsspælarin Christian Lamhauge Holst heldur fram við at gera um seg í næstbestu deildini. Sunnudagin skoraði hann trý mál í landskappingini, og mikukvøldið skoraði hann tvær ferðir, tá ið Lyngby tryggjaði sær luttøku í áttandaparts finaluni.

Lyngby var á útivølli móti Døllefjelde-Musse, sum onkra ferðina áður rættuliga hevur gjørt um seg í steypakappingini. Heimaliðið legði seg framum bæði 1-0 og 2-0, men tveir minuttir undan steðginum minkaði Christian Lamhauge Holst um munin, tá ið hann var á rætta staðnum røttu løtuna og setti fótin undir innlegg úr høgru.

Fimm minuttir undan leikloki var Christian aftur upp á spæl, tá ið hann økti Lyngby leiðsluna til 4-2. Aftur var tað eftir innlegg úr høgra borði. Lyngby vann 5-2.

Eisini Frem við Jón Róa Jacobsen millum teir fyrstu ellivu tryggjaði sær pláss í næsta steypaumfarinum. Frem hevði vitjan av AB, sum legði seg á odda, tá ið ein hálvur tími var farin. Frem javnaði í 38. minutti, og støðan var 1-1, tá ið vanliga leiktíðin var farin. Í yvirtíðini í 1. hálvleiki í longdu leiktíðini skoraði Frem sigursmálið til 2-1. Tveir minuttir frammanundan var Jónas Þór Næs komin á vøllin.

Jón Rói Jacobsen spældi alla tíðina. Í onkrum hornasparksstøðum var um reppið, at hann skoraði fyri Frem.

Í Danmark snúði mesta fótbóltsprátið mikukvøldið seg um, at superligu liðið AGF, sum eftir ógvuliga tama byrjan so spakuliga er farið at koma fyri seg í landskappingini, tapti 2-0 á útivølli móti Randers, sum fyrr í summar flutti niður úr superliguni.

Áttandaparts finalurnar í steypakappingini eru á skránni 19. oktober. Tá fara tey feløgini í superliguni at taka lut, sum ikki higartil hava verið uppií. Tað snýr seg eitt nú um AaB og Súna Olsen.

# Føroyar fáa ein orduligan lúsing

**Soltna úrtøkan ber við sær, at Føroyar eftir einum mánað eru farnar átta pláss skeiva vegin á FIFA styrkislistanum**

ALTJÓÐA FÓTBÓLTSSTYRKI
*Jóannes Hansen*

Tað sæst aftur á FIFA styrkislistanum, at Føroyar seinastu vikurnar hava lagt rygg til fleiri tap í HM undankappingini í fótbólti. Serliga munnu tað vera tapini á heimavølli móti Kypros og Ísrael, sum hava kostað. Føroyar taptu 3-0 móti Kypros og 2-0 móti Ísrael. Hesi tapini hava ivaleyst nívt dyggari, enn 3-0 tapið á útivølli móti Fraklandi hevur gjørt.

Sambært FIFA listanum, sum varð kunngjørdur í fyrradagin, so eru Føroyar nú styrkismettar at vera nummar 134. Talan er um átta pláss niðari á stiganum, enn Føroyar vóru fyri einum mánað síðani. Ongantíð áður er tað komið fyri, at Føroyar eru farnar so nógv eftir hæli upp á so stutta tíð, og Føroyar hava ongantíð verið longri niðri á listanum, enn tær nú eru tað.

Ísrael og Kypros hava flutt seg rætta vegin, eftir at tey hava vunnið á Føroyum. Ísrael er farið frá 47. og fram á 44. plássið, og Kypros er farið frá 105. og fram á 103. plássið.

Áður hava innanhýsis úrslitini móti øðrum smáum europeiskum fótbóltstjóðum borið boð um, at Føroyar hava verið stinnari enn eitt nú Liktinstein, Malta og Andorra. Føroyar hava eisini fyri tað mesta verið hægri á listanum enn hesar fótbóltstjóðirnar. Sambært nýggja listanum verða hesar smáu europeisku fótbóltstjóðirnar nú roknaðar at eiga betri fótbóltslandslið, enn Føroyar verða mettar at eiga.

Liktinstein hevur gjørt eitt orduligt skarvslop. Pinkulandið, sum Føroyar hava vunnið allar tríggjar innanhýsis landsdystirnar ímóti, er lopið sekstan pláss rætta vegin og er nú á 123. plássinum. Malta, sum Føroyar eisini hava vunnið allar tríggjar innanhýsis dystirnar ímóti, er lopið ellivu pláss rætta vegin og er nú á 127. plássinum. Andorra er farið níggju pláss rætta vegin og er nú nummar 125.

Listin sær nú soleiðis út. Tølini í klombrum siga, hvat pláss londini høvdu fyri einummánaði síðani.

| | | |
|---|---|---|
| 1 | (1) | Brasil |
| 2 | (3) | Holland |
| 3 | (2) | Argentina |
| 4 | (4) | Kekkia |
| 5 | (5) | Mexico |
| 6 | (9) | Frakland |
| 7 | (6) | USA |
| 8 | (8) | Spania |
| 9 | (9) | Portugal |
| 10 | (15) | Svøríki |
| 11 | (7) | Ongland |
| 14 | (18) | Danmark |
| 21 | (14) | Írland |
| 37 | (36) | Noreg |
| 38 | (42) | Sveis |
| 40 | (43) | Finnland |
| 44 | (47) | Ísrael |
| 92 | (94) | Ísland |
| 103 | (105) | Kypros |
| 134 | (126) | Føroyar |

# Claus fekk aftur eitt stig

**Føroyski landsliðsspælarin var á vøllinum alla tíðina mikukvøldið, tá ið Coventry tryggjaði sær javnleik í torførum útidysti**

ONGLAND 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Enn eina ferð var føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen millum teir fyrstu ellivu, tá ið Coventry City mikukvøldið spældi á útivølli móti Derby County. Claus var á vøllinum alla tíðina.

Heimaliðið legði seg á odda við máli sum Morten Bisgaard skoraði. Hesin Morten er gamal liðfelagi hjá Toda Jónsson í FCK. Í danska felagnum hevði miðvallarin ilt við at vinna sær fastan sess. Tað tykist ikki at vera trupult hjá honum í Derby.

Coventry javnaði í 2. hálvleiki til endaliga úrslitið 1-1. Málskjútti var ein, sum nevnist Dele Adebole. At fáa eitt stig á útivølli móti Derby verður í Coventry roknað at vera gott úrslit.

Eftir at hann nakrar ferðir fyrst í hesum kappingarárinum var á beinkinum, hevur Claus tær seinastu ferðirnar verið millum teir fyrstu á Coventry liðnum. Venjarin, Micky Adams, tykist hava álit á miðvallaranum, sum harvið fær dystarvenjingina, sum er so týdningarmikil.

Tað er eingin ivi um, at boð fara at verða send eftir Claus Bech Jørgensen, tá ið síðsti landsdysturin í hesi HM undankappingini verður á skránni í Ísrael 8. oktober.